# TILTØK

**Føroyingafelagið í Reykjavík**
Elin S. Wang, Melabraut 8, 170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.n-orden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Føroyskt møti í Álborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

**Kristnastova**
Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax. 32586149
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukv. kl. 20.30.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni**
Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

fk

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666




**Vika 26 – 26. juni**
Vinnaratøl: **01 - 09 - 11 - 28 - 42 - 46**

Eykatøl: **08 - 33**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **2.657.971,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **154.019,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **4.277,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **120,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

# VALUTAKURSIR

| | | 26.06.02 | Ultimo mai |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 749,2600 | 803,4900 |
| Bretland | **Pund** | 1144,7200 | 1172,1800 |
| Svøríki | **Króna** | 81,6800 | 81,3700 |
| Noreg | **Króna** | 100,8900 | 100,4400 |
| Sveits | **Frankur** | 506,9200 | 508,4000 |
| Ísland | **Króna** | 8,5300 | 8,7000 |
| Kanada | **Dollari** | 495,5300 | 524,2700 |
| Japan | **Yen** | 6,2683 | 6,4490 |
| | **Evra** | 743,0400 | 743,6300 |

FØROYA SPARIKASSI

# KROSSORÐ



**Vinnari:**
*Jóhannes Henriksen*
*Heiðaskákið 8*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: CHAUVINISMA



## Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ..« á bjálvan.

**306**

**Loysunarorðið:** ...................

Navn: ........................

Bústaður: ......................

Bygd/býur: .......................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Málllæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***



# HEILSANIR



Eg og foreldur míni takka øllum, sum gleddu meg til mína konfirmatión tann 24.3.
**Heilsan, Jóhannes Erling Poulsen, Tórshavn**



**Góði, fitti Absalon!**
Lukku og gleði á 3 ára degi 28.6. Eisini ein heilsan til Harriet.
**Heilsan, Sjúrður og Eydna**



**Góða Ansa!**
Tillukku við próvnum. Gleði meg at sleppa at eta.
**Gita hvør**





**Góða Doris**
Vit ynskja tær ein góðan túr til Florida og ynskja tær hjartaliga tillukku og góða eydnu á 16 ára føðingardegnum 13. juli. Vit elska teg.
**Heilsan, mamma og babba**



**Góða Silvia!**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum og alt gott í framtíðini ynskja
**mamma og babba í Reykjavík**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum 25.6. og takk fyri at tú altíð ert so góð við okkum. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan, Allan og Helgi**



**Góða mostir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum. Gleða okkum at sleppa biltúr við tær.
**Bestu heilsanir frá Irenu og Vár**



**Góða Marsanna**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. takk fyri manga hugnaliga løtu.
**Heilsan, myndatakarin**



Eitt stórt tillukku til Høgna Arnbjarnarsson, sum á Heriot-Watt Universitety í Edenburg hevur lokið prógv sum BSC (Honours) í Food Science, Technologi and Management.



**Góði, elskaði Karl**
Tillukku við 5 ára degnum í dag. Nú ert tú stórur.
**Bestu heilsanir, babba, mamma, John og Knút**



**Góði, allarbesti Absalon**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Mamma, babba og Harriet**



**Góðu Tóra og Teitur**
Skjótt gongur tíðin. Hjartaliga tillukku við prógvunum. Alt tað besta í framtíðini.
**Halla og Rasmus**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum, ið var 25. juni ynskir
**lítla Sonja**



**Góði, allarbesti Sjúrður**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum, ið var 24. juni. Øll góð ynski frá
**mammu, babba og Eydnu**

## Heilsanir
30,- kr. Sosialurin
**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«